C-dur

C G
1/5. So mangan lesur tú um Jesu undurverk,
G C
Um alt hann gjørdi og alt hann lærdi.
C G
Men les enn einaferð og biðj enn eina bøn,
G C
So skalt tú síggja Guds miklu kraft.

C F C
Tað hendir enn um bert vit biðja
G C
Ja, um vit biðja – tað hendir enn.
C F C
Sum bønar svar, Gud enn ger undur,
C G C
Ja, mikil undur Hann gera vil.

2/5. Á veg til Náin gekk – mín Harri einaferð
Hann eina mammu sær – við soni deyðum.
Men skjótt var sorgin gloymd,
Tí sí – eitt undurverk,
Tá Jesus reisti hin deyða upp.

3/5. Tá Jesus vendi heim til Gud í himlinum
Tá gav hann lyfti, um andans gávu.
Í trúgv tey samlaðust á einum stað í bøn,
Skjótt hoyrdist tungutala, - lovsongur.

4/5. Í dag vit lesa enn um tað sum hendi tá,
Um vekingar í teim´ fyrstu tíðum.
Mong blivu frelst og doypt –
Trítúsund bert ein dag –
Ja, tá var eldur og tá var lív.

5/5. Men størst av øllum er – og tað er allarbest,
Tað er at menniskju enn kunnu blíva frelst.
Eg minnist enn í dag tá eg við Golgata,
Fekk fyrigeving – alt gjørdist nýtt.